# Oljan kann broyta nógv



*Mattias Frithiof er annar av teimum báðum analytikarunum, sum hava ratað Føroyar*

**- Verður olja funnin á føroyska landgrunninum, kann tað broyta ratingina hjá Moody's munandi, men tað veldst sanniliga eisini um, hvussu eitt oljuríkidømi verður umsitið, sigur Mattias Frithiof, ið er annar av teimum báðum analytikarunum, sum hava ratað Føroyar**

RATING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur lisið grundgevingarnar hjá Moody's Investors Service, fyri at rata Føroyar har, sum tær eru rataðar.

Vit hava serliga heft okkum við í fyrsta umfari fýra økir ella grundgevingar, sum vit fegnir vildu hava útgreina gjøllari. Tí settu vit okkum í samband við deildina hjá Moody's í London at vita, um vit kundu fáa eina nærri frágreiðing.

Tað vóru serliga nakrir spurningar, sum Moody's listaðu undir »Credit Challenges« - ella øki, ið draga niður í samlaðu metingini, ið eru áhugaverdir.

Gjøgnum kunningardeildina hjá felagnum fingu vit orðið á Mattias Frithiof, sum er annar av teimum báðum analytikarunum, sum hava vektað Føroyar. Mattias Frithiof er svii, men av praktiskum orsøkum fór samrøðan fram á enskum. Fyrst spurdu vit Frithiof, hvat ein munur millum triðja pláss og fimta pláss á listanum í krónum og oyrum merkti í hægri rentukostnaði, við upptøku av láni uttanlands.

- Tað er ógvuliga ilt at siga. Tað er heldur ikki okkara uppgáva at meta um, tí hetta er nakað, sum er upp til marknaðin at taka støðu til. Okkara uppgáva er meiri at veita upplýsingar til marknaðin, sum teir so nýta, sum teimum lystir. Men alt annað líka skuldi hetta ávirka lánsrentuna positiva vegin, sigur Mattias Frithiof.

Upp á spurningin um, hvørt ratingin hevði verið øðrvísi, um teir høvdu eina undanfarna rating at sammeta við, og hetta sostatt ikki hevði verið hon fyrsta, sigur analytikarin frá Moody's:

- Nei, vit hava okkara kriteriir at ganga eftir, og ein fyrsta rating er einki ólík einari aðrari vanligari uppfylgjandi rating.

## Trupulleiki og ábyrgd

Seinastu tveir spurningarnir snúðu seg um økir, listað undir »Credit Callenges«. Hin fyrri gekk út upp á hvørji øki, listað undir omanfyri nevnda vórðu lættast hjá landsstýrinum at fáa á rættkjøl, og hvørji taldu mest á rættari leið móti hægri rating næstu ferð.

- Hatta er ein tvídeildur spurningur, tí aloftast er tað so, at tey øki, sum eru løtt at rætta upp á, hava minstu ávirkan á ratingina, meðan tað eru tey truplu økini at broyta, sum viga tyngst í ratingshøpi, sigur Mattias Frithiof.

At enda vildu vit vita, hvat var galið við roknskaparskipanini, sum landsstýrið nýtir.

Og har vóru nevnd fleiri ymisk viðurskifti. Okkurt var gott, men á øðrum økjum stóð verri til.

- Skipanin hevur ikki lógarfest støði. Men tað er altíð ein spurningur um, hvat tit halda, tit hava brúk fyri, og tað er ikki altíð tað sama, sum vit halda vera tað besta, sigur Mattias Frithiof.

Víst verður eisini til, at landið átti at havt gjøllari eyga við kommununum eins og íløgurnar áttu at verið betri stýrdar.

Men tað, sum stendur greiðast eftir, er sannroyndin, at skulu vit koma okkum longri upp á ratinglistanum, er oljan mest sannlík at hava neyðugu ávirkanina, nær og um hon fer at spríkja.




HYNDAI

**Skrásetingarnr:** ER 611 **Km:** 106.000
**Árgangur:** 01.07.2003

**Kr. 68.000,-**



SUBARU LEGACY 2,0 Aut. — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006

**Kr. 225.000,-**



TOYOTA AURIS 1,6i H/B LUNA — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SP 208 **Km:** 5.431
**Árgangur:** 07.11.2007

**Kr. 214.000,-**



TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL Aut. Sed. — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PK 891 **Km:** 67.000
**Árgangur:** 23.03.2004

**Kr. 190.000,-**



TOYOTA COROLLA 1,8 VERSO VAN 5D — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HF 200 **Km:** 67.800
**Árgangur:** 06.02.2003

**Kr. 104.000,-**



TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL STW. — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LK 788 **Km:** 40.000
**Árgangur:** 20.08.2003

**Kr. 188.000,-**



VW GOLF 1,6 FSI — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NT 463 **Km:** 58.000
**Árgangur:** 04.12.2003

**Kr. 148.000,-**



PEUGEOT 206 1,4 BENSIN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TE 795 **Km:** 28.000
**Árgangur:** 31.05.2006

**Kr. 145.000,-**



TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN

**Skrásetingarnr:** DT 976 **Km:** 126.911
**Árgangur:** 09.06.1999

**Kr. 54.000,-**



HYUNDAI MATRIX 1,6

**Skrásetingarnr:** HV 129 **Km:** 82.000
**Árgangur:** 04.08.2003

**Kr. 68.000,-**

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F